## DAGSINS MEINING

# Samgongutalvið

Stórt spell hevði verið, um smalast gjørliga samgonga gjørdist veruleiki. Tað sær tíverri út sum, at hetta er rættiliga sannlíkt í løtuni. Løgmaður hevur altíð tosað um breiðu semjuna, men ikki sæst hon í 17 manna samgonguni, ið nú verður samráðst um. Harmiligt er, um tríggir stórir flokkar ikki kunnu semjast um eina samgongu. Við trimum stórum flokkum hevði man aftur fingið politiskan stabilitet í Føroyum.

Fyri stuttum vóru samráðingar millum Fólkaflokkin, Sjálvstýrisflokkin, Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin. Hesar samráðingar slitnaðu, og sum skilst var tað millum annað spurningurin um yvirtøku av løgreglu og rættarskipan. Nú kemur fram, at Sjálvstýrisflokkurin heldur ikki vil tað sama sum Tjóðveldisflokkurin í hesum máli, og tí burdi hetta ikki verið nakar trupulleiki millum Javnaðarflokkin og sitandi samgongu, eftirsum hetta eftir øllum at døma verður av ongum í hesumv alskeiðnum óansæð.

Sjálvsagt eru spenningar millum flokkar og ikki minst millum veljararnar hjá ymisku flokkunum eftir eitt drúgt valstríð, men nú er tíð at leggja gamalt agg til viks og ignorera persónsspurningar. Hetta kundi verið ein áheitan á Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin. Hesir báðir flokkar hava síðani 1974 arbeitt sera væl saman, tá teir hava verið í samgongu, og tað skerst ikki burtur, at tey størstu fetini á sjálvbjargnisleið hava verið tikin av javnaðarløgmonnum í samgongu við Tjóðveldisflokkinum og í ein ávísan mun Fólkaflokkinum Sjálvstýrisflokkinum. Spell hevði verið, um hesin søguligi arvur datt niðurfyri av óstórsligum politiskum kegli, ið hevur merkt løgtingsarbeiði og seinastu tíðina eisini fólkatingsarbeiði.

Sjálvsagt skal samgonguluttøka ikki gerast eitt mál, ið skal røkkast fyri ein og hvønn prís, men Javnaðarflokkurin kundi lagt virði til samgonguna við at hála sjálvbjargniskósina inn aftur á beint av tí síðuspori, man hevur fylgt í 4 ár. Í hvussu er tveir av samgonguflokkunum taka fult undir við hóvligu kós Javnaðarfloksins, og veljarar javnaðarfloksins høvdu ivaleyst fegin vilja sæð tiltrongdu broytingina í føroyskum politikki.

Eitt konstruktivt uppskot kundi verið at avskaffað Landsstýrismannin í Sjálvstýrismálum og givið løgmanni uttanríksimál aftur, sum gamalt er. Tjóðveldismenn mugu geva okkum rætt í, at yvirtøkur og sjálvstýristilgongd eigur at vera ein integreraður partur av øllum málsøkjum, og tí er ikki neyðugt við einum slíkum landsstýrismanni. Tað hevði verið einki minni enn eitt bragd, um Javnaðarflokkurin hevði megnað at fingið samgonguflokkarnar inn á beint í sjálvstýrismálinum, so at allir flokkar nú aftur kundu ført politikk, eftir løgnu framferðina seinastu 4 árini. Hetta krevur, at konstruktivar kreftir handla skjótt og byggja brýr áðrenn tingfundin hósdagin. Nøkur høvdu helst gjørst ónøgd, um breiða semjan gjørdist veruleiki, men alternativið er smala samgongan, har nærum øll eru ónøgd. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Er Miðflokkurin farin at siga ósatt?

**Páll Poulsen**



– og at manipulera við stuðlinum úr Danmark til Føroyar?

**Er stevniskrá miðfloksins ikki bygd á hellubotn?**
Miðflokkurin hevur nú síðan valið verið kumpassina runt fleiri ferðir. Hansara trúvirði er minkað nógv millum veljaran, eru hugsjónirnar sum flokkurin byggir á settar til viks fyri løtuvinning. Flokkurin sýnist at byggja á kyksendi.

**Politiska spælið**
Tað tykist sum um, tað eru mangir mátar at brúka blokstuðulin til í politiska spælinum. Tað seinasta vit hoyra um frá Miðflokkinum er, at blokstuðulin ikki skal minka við nakrari yvirtøku, og at tað finst nógv at yvirtaka sum einki hevur við blokkin at gera. Í hesum sama andadrátti verður kirkjan nevnd. Um hetta ikki er at manipulera við nøkrum veruleikum, so veit eg ikki hvat manipulatión er fyri nakað.

**Beinleiðis blokkurin**
Tann beinleiðis útgoldnið blokstuðulin í landskassan úr Danmark er til økir, sum vit sjálvir umsita so sum sjúkrahús, serforsorg, eftirlønir til fyrrverandi danskar embætismenn (føroyingar) búgvandi í Føroyum, sum fara at minka í tali sum tíðin líður og Fiskirannsóknarstovan íalt 615 mió.kr..

**Óbeinleiðis blokkurin**
Harafturat gjalda danir alt (ein annan stóran blokk) til mál sum teir sjálvir umsita í Føroyum, tað veri seg politi, kirkja, verjumál, dómhús, stuðil til okkara ungu lesandi og mangt annað, sum telur rættiliga nógvar 100 mió. kr. Tí er tað líka mikið hvat tú yvirtekur harra Jenis av Rana, stuðulin sum kemur bæði beinleiðis ella óbeinleiðis í landskassan kemur at minka til Føroyar hvussu tú so vendir tær.

Tú ætlar væl ikki, at danir framhaldandi skulu gjalda fyri kirkjuna, politi og alt annað tá íð tit hava yvirtikið hesi mál ?

Annars haldi eg, at tað mátti verið mannsligari og reinari fyri flokk tykkara, at spurt limirnar í fólkakirkjuni fyrst, um meiriluti er fyri at yvirtaka kirkjuna, tað vil siga spyrja tey, sum gjalda gjøgnum skattin raksturin av kirkjuni í dag undantikið prestalønir.

# Hatta hevði hon ikki uppiborið!

**Finnur Jensen**



Eg var ikki sørt skelkaður leygarkvøldið av úrslitinum av Grand Prixnum. Okkara donsku brøður endaðu á einum suverenum aftasta plássi.

Eg og mong við mær lótu eitt tár renna úr eygunum, tá ið vinar- og kenningarpolitikkurin hevði havt sína endaligu staðfesting av úrslitinum. Rætt er, at lagið hjá Malenu ikki var á sama støði sum hjá teimum báðum undanfarnu perlunum frá ávíkavist Olsen brøðrunum og Rollo og King, men at enda sum nummar sjokk, tað hevði Malena ikki uppiborið.

Eitt er, at bæði hasir griksku buttutu hermenninir og hasir russisku klovnarnir fingu fleiri stig enn Malena, men tað sum verri er, at vit ikki vera við næsta ár orsakað av politiskum lobby-arbeiði millum evropeisku londini.

Nú er tann stundin komin, at hasin vinar- og kenningarpolitikkurin einaferð med alla verður sparkaður út, soleiðis hetta megnar mentunartiltak, sum hevur vunnið hjartað á mongum føroyingi, kemur aftur á beint.

# Tøkk

**Eli Christiansen**



Fari við hesum at takka teimum, sum atkvøddu fyri Fólkaflokkinum á løgtingsvalinum 2002. Ein serlig tøkk til teirra, sum stuðlaðu mær persónliga.

Hesin stuðul hevur saman við nógvum góðum viðmerkingum eggja til at arbeiða víðari fyri teimum mál-um, vit hava sett okkum. Sjálvbjargni, menning, trivnaður og møguleikar til øll.

Vit mugu síggja til, at tann neisti, sum er tendraður fyri sjálvbjargni, ikki verður køvdur av fólki, sum bert finna lívd og føði undir ostakoppinum. Vit eiga sum land og fólk ikki at vera til byrðu í einum heimi, sum hevur nokk at bríggja seg um frammanundan. Vit eiga at klára okkum sjálv og heldur vera við at gera land okkara og heimin betri.

Sjálvbjargni kemur ikki av sær sjálv, tað mugu vit seta okkum fyri og arbeiða fyri. Verði tit við at arbeiða fyri hesum stórbæra máli, sum vit røkka við skynsemi og tolsemi.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

Fyribyrgingarráðið - spurningar og svar um tubbak - "Hví tað loysir seg at gevast."

# Eg havi roykt í 20 ár. Er ikki longu ov seint?

**Nei, tey góðu tíðindini eru, at tað er ongantíð ov seint at gevast. Tú skerjir vandan fyri sjúkum, íð standast av tubbaki næstan alt fyri eitt, tú heldur uppat at roykja.**

Sjálvandi er betri, skjótari tú gevst.

Eftir 20 minuttum: - tekur nøgdin av tubbakseitri at minka, og blóðtrýstið, hjarta-slátturin og pulsurin verða aftur, sum tey eiga at vera.

Hetta ger, at vandin fyri hjartaslagi minkar.

12 tímum: nøgdin av kolsúrevni í blóðinum minkar, og nøgdin av súrevni økist.

einum mánaði: fert tú at duga betur at meta um, hvussu okkurt angar og smakkar. Lungnapípurnar verða smidligari, so tað verður lættari hjá tær at draga andan djúpt. Kroppurin hevur stríðst við at endurbøta nervalagið. Tú fert kanska at varnast, at tú orkar meira.

tveimum til trimum fært tú kanska 30% av lungnavirki aftur. Tú fert at orka meira mánaðum: og føla, at tú fært gjørt fleiri kropsvenjingar.

seks til nýggju: útlitini til, at tú fært lungnasjúku, eru minni, tí kyknurnar, sum mánaðum: klæða lunguni, nú aftur verða so, sum tær skulu vera og gera sítt til, at lunguni hjá tær eru rein og heilsugóð.

einum ári: vandin fyri, at tú fært hjartasjúku, er skorin niður í helvt. Tú hevur eisini skert vandan fyri striki, lungnasjúku og fleiri sløgum av krabbameini, teirra millum lungna-, hálsa- (lívmóðurhálsa-), bløðru- og nýrakrabba og krabba í brisi, barkakýli og vælindi.

fimm árum: vandin fyri, at tú fært lungnakrabba er umleið helvtina av vandanum hjá honum, íð roykir ein pakka um dagin.

tíggju árum: vandin fyri, at tú fært lungnakrabba, er næstan líka lítil sum hjá einum, ið ikki roykir. Frískar kyknur eru komnar ístaðin fyri tær kyknur, íð koma áðrenn krabbameinskyknurnar koma.

(Tikið úr 'Tá ið síðsta sigarettin er roykt', Amerikanska tubbaksráðið 1995, 1996)

Gevst tú at roykja, minkar tú eisini vandan fyri, at tey, sum eru uttan um teg og anda roykin frá tær niður í seg, verða sjúk.

Legg-av pakkar verða aftur seldir á apotekunum um landið 29. - 31. mai fyri 25 kr.

Hygg eftir seðilinum, sum verður í bløðunum vikuna áðrenn, klipp hann út og nýt hann til at keypa pakkan, sum inniheldur nikotin tyggigummi.

# Nær eru Føroyar vorðnar ein partur av Danmark???

*Símun A. Klein*

Núverandi Løgmaður hevur í fleiri nýttársrøðum úttalað seg um, at Føroyar eru ein undirgivin partur av Danmark, og at danska grundlógin er galdandi sum grundlóg fyri Føroyar.

Men nær er hettar so hent??? Og hvussu hendi hettar???

Eg havi gingið 10 ár í skúla í Føroyum, men ongantíð verði kunnaður um hesi viðurskiftir. Hvussu ber tað til???

Men eingin høvdingi úti á Tinganesi hevur enn kunna staðfest hesar pástandir uppá nakran sum helst máta.

Men teir ella tey, sum halda fast um, at Føroyar eru ein undirgivin partur av Danmark, mugu eisini kunna siga nær og hvussu hettar hendi. Men størstur er áhugin yvir fyri at síggja tey skjøl, ið prógva, at áðurnevndu pástandir hjá landsins sokallaðu leiðandi monnum eru trúverdigir og sannir. Og her verður so hugsað um ekta skjøl. Reyp og skrøgg er nokk av í samfelagnum.

Men hettar er serstakliga vert at hugsa um:

Hvørja ferð landaumráðir skifta eigara ella at broytingar verða gjørdar á tí ognarrættarliga økinum, so verða eisini altíð skjøl gjørd sum siga frá, hvørjar broytingar eru framdar ella hvør nýggi eigarin er á ognarskiftinum o.s.fr..

Men tá tað snýr seg um, nær Føroyar eru vorðnar danskur ríkislutur, hvar tær áður vóru ein norskur ríkislutur, ja, so eru enn eingin skjøl løgd á borðið nakrastaðni og fyri nøkrum sum prógva, at slíkt er fari fram nakrantíð.

Í Danmark verður nógv gjørt burtur úr, at allir borgarar skulu hava rætt til at hava aktindsigt í teirra egnu viðurskiftum, og tað fáa tey eisini, um tey vilja, men hvussu er í hesum viðurskiftunum???

Kunnu føroyingar fáa aktindsigt í einum slíkum máli???

Tí onkrastaðni eru slík skjøl at finna, sum kann kasta ljós yvir málið, so at óupplýst kunnu fáa vit og skil um egin mál.

At svara uppá hettar við at siga, at slík skjøl eru ikki til, er tað sama sum at viðganga, at Føroyar eru ikki ein danskur ríkislutur.

Við tøkk fyri upptøkuna:

# Til rætta viðkomandi

*Sølvi Andreasen*

Tað var við ikki sørt av bilsni ein hoyrdi tíðindini í Ú.F. har greitt varð frá, at Scania gavst við siglingini til Suðuroyar.

Stutt frammanundan hevði strandferðslan stórtíðindi at bera fram í Ú.F., har teir søgdu, at Scania var framleigað í 14 dagar framyvir, tí hon skuldi røkja suðuroyarsiglingina??

Hvar eru teir skipakønu hjá Strandferðsluni?? Og so skulu hesir ráðgeva í bygging av nýggjari ferju til suðuroyarsigling, hettar man vera skemt???

Ein kundi spurt - hvat hendir við slíkum ráðgevum, stjórum sum søpla milliónir av landsins (les fólksins) peningi burtur, av berum ódugnaskapi??

Dúgvan hevur fyrr fingið noktað atløgupláss í Suðuroy, stendur hettar ikki við?

Hvussu ætlar Strandferðslan at flyta rusk, sum hevur ligið og í skrivandi løtu t.v.s. t. 22.05.02 enn liggur og flýtur her suðuri, tí I.R.F ikki enn er byrja at virka aftur í Suðuroy eftir streykuna. Hvussu ætlar strandferðslan, at flyta hettar og farm frá virkjum saman við ferðafólkið - Smyril var mangan ovfyltur - halda ráðgevarnir at Dúgvan er størri??

Til síðst ein áheitan á pol. mynduleikan, tað ber ikki til, at suðuroyggin sum hevur ligið uttan samband í longri tíð vegna verkfall, nú skal fara 50 ár aftur í tíðina hvat ferðasambandi oyggjanna millum viðv. vegna ódugnaskap av teimum sum skulu skipa fyri. Áheitan mín er set Smyril aftur í sigling, til tit fáa eitt skip, sum er betur egna til Suðuroyarsigling.

Tað er eitt krav, at vit fáa somu sømdir sum allir aðrir føroyingar. Vit biðja ikki um serrættindi – men um líkarætt.

Sølvi Andreasen
sa2506h3@skulin.fo

# Pop Top kanska gott nokk

*Hallur Hansen*

Tað var ein hugnalig løta í Grasagarði leygardagin 18 mai, har fitt av fólki var komið saman at lurta eftir teimun ungu rokktónleikarunum, ið fyri fyrstu ferð skuldu trína inn á rokkpallin.

Bólkarnir vóru 4 í tali, 3 úr Havn og ein úr Eysturoynni. Ikki sum kunngjørt var áðrenn, at allir bólkarnir vóru úr Havn.

Tórshavnar Musikk skúli og Mjólkarvirki Búnaðarmanna stóðu fyri tiltakinum, og Brandur Øssurson sá út til at vera tann, ið skipaði fyri. Veðrið var av tí fagrasta hendan dagin.

Áðrenn konsertin byrjaði, vóru atkvøðuseðlar býttir út til áhoyrararnar, so teir kundu seta kross við tann bólkin, ið teir mettu at vera tann besta.

Allir bólkarnir stóðu seg væl á pallinum og tóku teir uppgávuna í fullum álvara. Summir av bólkunum spældu løg hjá øðrum kendum bólkum, og onkur bólkur hevði smíðað egin løg, og komu teir væl frá tí.

Tá ið tann síðsti bólkurin var liðugur við sína framførslu, klappaðu áhoyrarnir av tí mesta, og fólk gjørdu seg til reiðar at fara at handa atkvøðuseðilin.

Har stóðu eini 100 fólk og bíðaðu eftir at sleppa av við atkvøðuseðlarnar, tá Brandur Øssurson kom og segði:

»Farið tit út, tað er liðugt at stemma«.

Síðan kunngjørdi hann navnið á vinnarabólkinum, uttan at tú fekk at vita, hvussu nógvar atkvøður nakar bólkur hevði fingið .

Har stóðu vit øll sum kánus. Bólkurin úr Eysturoynni var júst á veg av pallinum, og sóu teir út til at blíva rættuliga vónsviknir og bilsnir.

Lagið bleiv ikki betur, tá ið tað vísti seg, at fleiri av hesum atkvøðunum, ið ikki sluppu upp í part, vóru til bólkin SIC úr Eysturoynni .

Tað fór líkasum eitt kalt lot ígjøgnum Grasagarð. Einki bleiv gjørt burtur úr vinnandi bólkinum, ið eisini hevði eina góða framførslu.

Fólkið fór so spakuliga til hús, og nógv fóru við kensluni av, at »Hatta var ein løgin endi«.

Og tað var ein løgin endi á konsertini. Bólkarnir hava stríðst í mánaðir til hesa konsertina, so eg meini, at teir høvdu uppiborið eina betri fyrireikaðað konsert.

Samanumtikið skal ikki nógv til, at gera tað nógv betur.

# Skótar hava marknaðardag

SKÓTAR
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 1. juni skipar Skótalið Sigmunds Brestissonar fyri marknaðardegi á Føroya læraraskúla fyri alla familjuna. Byrjað verður kl. 10 fyrrapart og hildið verður á til kl. 17.

Tiltøk á skránni eru m.a.: Fiskibrunnur, loppumarknaður, køku- og mattombola, bólttakast, hoppiborg, klatriveggur, skattajakt, bilavask, bátahylur og andlitsmáling.
Á lutaseðli: Fartelefon og annað.

Um veðrið verður gott, er ætlanin at hava tiltøk bæði uttandura og innandura, annars verður alt innandura.

Kl. 14 spælir Havnar Ungdómshornorkestur